# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

Tekniski Skúlin í Tórshavn 70 ár:

## Næstu ferð í nýggjum skúla

**Millum 200 og 300 fólk vóru savnaði á Skúlaheiminum við Marknagilsvegin mikudagin 10. november í samband við at Tekniski Skúlin í Tórshavn fylti 70 ár. Tað var Havnar Handverksmeistarafelag, sum tók stig til at seta skúlan á stovn tann 10. november 1934**

MÓTTØKA
*Myndir: Jens Kr. Vang*



*Jens Marius Poulsen, kommunustjóri, handar Egon Øregaard, skúlastjóra, blómutyssi frá Tórshavnar Býráð*

Mikudagin 10. november hátíðarhelt Tekniski Skúlin í Tórshavn 70 ára stovningardagin hjá skúlanum.

Egon Øregaard, skúlastjóri, beyð øllum at vera vælkomin og segði frá skránni fyri móttøkuna. Síðan var tónleikaframførðsla av Andreu Heindriksdóttir og Ragnari Olsen.

Eitt snotuligt føðingardagsrit varð lagt fram, og blómutyssi varð handa til Tórfinn Smith, sum hevur staðið fyri føðingardagsritinum.

Tey sum fluttu fram røðu vóru: Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í mentamálum, Tummas H. Sørensen, stýrisformaður, og Egon Øregaard, skúlastjóri hugleiddi um skúlan.

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, og fyrrverandi lærari á skúlanum, helt eisini røðu, hann segði m.a. at tað var ikki myndugleikunum fyri at takka, at skúlin var tað, hann er í dag, men heldur dugnaligu starvsfólkunum á skúlanum.

Hann gleddist um, at endiliga var politisk semja um at geva skúlanum tær harðliga tiltrongdu umstøður, sum bíða hevur verið eftir í so nógv ár. Hann vónaði, at næstu ferð skúlin hevði jubileum, varð tað í nýggjum skúla.

Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í mentamálum, segði m.a. »Tekniski Skúlin í Tórshavn hevur, sum øllum kunnugt, ikki nøktandi hølisviðurskifti og hevur eisini seinastu tíðina havt ein aktivan leiklut í fyrireikandi arbeiðnum í sambandi við Skúladepilin í Marknagili. Tá landsstýrismaðurin fær politiska undirtøku fyri ætlanini, verður beinanveg farið undir at seta í verk hesa ætlan«.

Egon Øregaard, skúlastjóri, hevði eisini nakrar hugleiðingar á 70 ára degnum.

Hann nevndi nakað um søgu skúlans, og at Tekniski Skúlin í dag er ein vælvirkandi skúli við dugnaligum lærarum og starvsfólkum.

»Skúladepilin er fyri mær ein tann størsta nýhugsanin innan føroyska skúlaverkið í nýggjari tíð, og vóni eg at vit náa á mál nú.

Eg havi fleiri ferðir loyvt mær at brúkt vælkendu orðini hjá danska heimsspekinginum, Søren Kierkegaard, og fari at enda við hesari útsøgnini hjá honum: Livet kan kun forstås baglæns, men det må leves forlæns«, endaði Egon Øregaard.



*Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður, og Jógvan Hammer, lærari á skúlanum og fyrrverandi formaður í Føroya Læruráð*



*Tóta Sørensen, hárfríðkanarkvinna, hyggur spent at snotuliga føðingardagsritinum*



*Egon Øregaard takkar Tórfinni Smith fyri eitt væl úr hondum greitt føðingardagsrit*



*Pauli Hofgaard, stjóri hjá P/F Leif Mohr, Mads A. Winther, studentaskúlastjóri, Jón Danielsen, stjóri í Articon, Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum, Poul Michelsen, stjóri, Tummas H. Sørensen, stýrisformaður í Tekniska skúlanum, Jákup í Gerðinum, fyrrverandi skrivari hjá Føroya Handverksmeistarafelag*



NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Heilsuskúli Føroya, Tvøroyri:

## Heilsuhjálparar fingið prógv



**Hesar heimahjálpir hava tikið útbúgving sum heilsuhjálparar á Heilsuskúla Føroya á Tvøroyri**

*Aftast frá vinstru: Gunnjó Joensen, Eiði, Maiken Hentze, Trongisvágur, Sunrid Thorsteinsson, Vágur, Herborg Petersen, Fuglafjørður, Ingibjørg Joensen, Sumba, Jóhanna Sørensen, Húsavík, Elsa Jacobsen, Vestmanna, Ali Petersen, Funningur, og Herborg Hansen, Glyvrar.*

*Fremst frá vinstru: Ingun Joensen, Norðagøta, Hennvá Danielsen, Tvøroyri, Malla Lið Hansen, Miðvágur, Birna Rasmussen, Klaksvík, Heidi Thomsen, Sandvík, Eyðbjørg Gudmundsson, Skopun, Bina Eliasen, Leirvík, og Lisa Jóhannusdóttir, Sandavágur.*

## Egin Henriksen tikið sæti á tingi



10. november 2004 tók Egin Henriksen sæti á tingi fyri Jenis av Rana, sum er í farloyvi.

Hetta er fyrstu ferð Egin tekur sæti á tingi. Egin stillaði upp fyrstu ferð fyri Miðflokkin til valið í 2002, og til valið 2004 fekk hann næstflestar atkvøður á listanum. Egin situr í hesum umfari á tingi til 19. november.

Egin er útbúgvin skipsførari og programmørur og starvaðist hjá Elektron í 25 ár. Hann er 51 ára gamal, giftur við Maritu Arge og saman hava tey 4 børn, tveir synir og tvær døtur.





Samkoman Lívdin, Hoyvík:

## Spakin er settur í

**Mikudagin 10. november kl. 10 varð spakin settur í á grundøkinum hjá samkomnuni Lívdini í Hoyvík. Byggjast skal ein samkomubygningur, sum verður karmur um virksemi hjá Lívdini**

ÚTGREVSTUR

Umleið 50 fólk vóru komin saman mikudagin á grundøkinum hjá samkomuni Lívdini. Grundøkið er við Vegin Langa og Djúpagilsvegin í Hoyvík.

Tað var Leivur Guttesen, sum tann elsti av seks verjum fyri samkomuna Lívdina, ið fekk heiðurin at seta at seta spakan í.

Samkoman Lívdin varð sett á stovn í august 2001. Fyrstu tíðina var hildið til í Virkni á Berjabrekku og síðan 2002 í Hoyvíkar Skúla.

Eftir ætlan verður útgrevstur og planeringsarbeiðið liðugt í mai 2005, tað er Falkon Entreprenørfelag v. Jóhan Berg í Saltnesi, sum ger jørðarbeiðið.



*Mikudagin 10. november setti Leivur Guttesen, sum tann elsti av verjunum fyri samkomuna Lívdina, spakan í á grundøkinum við Vegin Langa og Djúpagilsvegin. Á myndini eru eisini Elin Wang, Jens Wang, Knút Dalsgaard og Nina Dalsgaard*

*Mynd: Árni Jakobsen*

H. N. Jacobsens Bókahandil:

## Starvsfólkini á prentsmiðjuni í 1949



Hesi vóru starvsfólkini á prentsmiðjuni hjá H.N. Jacobsens Bókahandli tá Martin Thomsen, sum hevði 60 ára starvsdag 9. november 2004, varð liðugur at læra til prentara í 1949.

Aftara rað f.v.: Erling Isholm, Meinard Túvulið, Hans J. Poulsen, og Max Olsen (dani).

Fremra rað f.v.: Oskar Hermansen, Jógvan Rasmussen, Martin Thomsen og Helga Djurhuus (Magnussen).

Jógvan Rasmussen var prentstjóri. Í 1955 tók Erling Isholm við sum prentstjóri, og síðan 1963 hevur Martin Thomsem verið prenstjóri.

Hans J. Poulsen, sum í dag er 83 ára gamal, arbeiddi umleið 60 ár á prentsmiðjuni. Meinhard Túvulið arbeiddi eisini á prentsmiðjuni í næstan 50 ár.

*Mynd: H.N. Jacobsens Bókahandil*

### Dagurin

**12. november. Torkil.** Teir vita ikki um nakað halgimenni við hesum navni, men tað er komið við í danskar álmanakkar frá 1725. Navnið er norrønt og er samansett av gudsnavninum Tórur, og Ketil, sum merkir *hattur* ella *hjálmur*.

Vanligur fyrsti liður í mongum staðarnøvnum í Føroyum. Torkil er eitt av teimum fáu persónsnøvnunum, sum er funnið á rúnasteini í Føroyum (í Sandavági).